


*ony Paris bíðaði í sjey ár eftir møguleikanum at koma aftur til Klaksvíkar. Nú hann fekk møguleikan mátti hann taka av, hóast familjan er eftir í Florida. Kærleikin til KÍ fekk hann at taka avgerðina*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tony Paris:

# Vit fa

**Tað hevur gingið sera væl hjá KÍ og Tony Paris higartil í ár. Sosialurin hevur fingið eitt prát við “frelsaran” hjá KÍ um fótbólt, familju og annað. – Kærleikin til KÍ fekk meg til at koma aftur, sigur Tony Paris**

SUCCÉSVENJARI
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Vit møta Tony Paris á vøllinum í Klaksvík saman við Paul Clapson. Julian Florescu og Sinisa Jovanovic eru í holt við at mála rundanum vøllin, og Tony Paris er arbeiðsformaður. Tony er sera blíður og fyrikomandi. Vit práta eitt sindur á vøllinum, áðrenn vit fara inn á KÍ-kontórið. Fyri mær sýnist Tony Paris at vera ein sera sjálvsikkur maður tó uttan at vera arrogantur. Hann er í javnvág við seg sjálvan. Hann er sera blíður at tosa við, men hann hevur eisini ein myndugleika yvir sær.